# Føroya Arbeiðsgevarafelag
**Faroe Employers' Association**

Vinnumálaráðið
Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn

Att.: Arne Poulsen

Tórshavn 22. marts 2007

Okkara tilv./Our ref.:
2-550001/Jan Mo/Vinnum-FAG-B-E
Tykkara tilv./Your ref.:

## Elveitingarlóg - viðmerkingar til broytt lógaruppskot

Í fyrra hoyringsskrivinum eftirlýsti Føroya Arbeiðsgevarafelag, hvussu nýggja elveitingarlógin kann tryggja, at vinnufyritøkur og borgarar kunnu fáa atgongd til ein lægri prís.

Í nýggja uppskotinum til elveitingarlóg er hesin spurningur heldur ikki viðgjørdur. Uppskotið leggur upp til, at prísurin verður ásettur soleiðis:
- at prísurin millum el-framleiðaran og SEV verður ásettur í framleiðsluloyvinum
- at netfelagið (SEV) skal hvíla í sær sjálvum

Mannagongdin verður sambært uppskotinum, at Jarðfeingi bjóðar loyvir út. Møguligir framleiðarar fara at bjóða, har ein prísur á elveitingin verður ásettur. Síðani fer Jarðfeingi í samráðingar við elframleiðaran, har ein prísur verður ásettur, sum somuleiðis skal góðkennast av orkumálaráðharranum. Hesin prísur verður galdandi upp til 20 ár.

Eingin leistur er gjørdur fyri, hvussu hesin prísur verður ásettur. Spurningar í hesum sambandi eru, hvussu avskrivingarprofilurin verður, hvussu býtið millum eginfígging og fremmandafígging skal vera, og hvat avkast elframleiðarin skal hava.

Ásett verður, at netfelagið skal hvíla í sær sjálvum. Her eru spurningarnir teir somu. Hvussu verður avskrivingarprofilurin og býtið av fíggingini. Og hvat merkir tað, at Netfelagið skal hvíla í sær sjálvum. Merkir tað, at felagið einki skal kasta av sær ella merkir tað, at felagið skal vera so mikið trygt, at tað skal hava eitt avkast fyri at kunna standa ímóti nosum, sum koma kunnu. Og merkir hetta, at framtíðaríløgur hjá netfelagnum framhaldandi skulu fíggjast yvir raksturin.

Prísurin til fyritøkur og brúkarar verður bygdur á tann leist, sum omanfyrinevndu avtalur skulu gerast eftir. Tó ber uppskotið brá av, at prísásetingin skal góðkennast av orkumálaráðharranum, og hetta kann vera ein trygd fyri, at eitt eftirlit verður við atburðinum hjá el-framleiðarum og netfelagnum, til gangs fyri kundan. Hetta setir stór krøv til innlit hjá myndugleikanum til at áseta rætta prísin. Jarðfeingi skal avseta neyðuga orku til innlit og vitan um ásetan av røttum prísi, um hetta skal vera ein trygd fyri kundan.

Ein ágóði av nýggju lógini er, at møguliga vera fleiri framleiðarar. Hetta kann føra við sær, at kapping verður um arbeiðsmegina, sum hevur førleika innan el-framleiðslu. Kapping verður tí um serfrøðina, sum í dag er á SEV, og tað kann viðføra, at vit fara at síggja øðrvísi og fjøltáttaðar loysnir á el-framleiðslu í framtíðini.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Tað er hinvegin kanska naivt at halda, at fleiri elframleiðarar vera. SEV fer allarhelst einsamalt at framleiða streym úr vatni og olju. Nýggju elframleiðararnir fáa møguliga loyvi til at gagnnýta alternativar varandi orkukeldur, so sum vindmyllur. Men her hevur SEV longu lagt eina ætlan, har fleiri vindmyllur longu eru settar upp, og ætlanin er at seta fleiri. Tí kann hugsast, at fáir ella kanska eingin nýggjur framleiðari, enn teir sum eru í dag, fara at koma inn á marknaðin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at ávísur røringur kemur í tann annars stirvna el-marknaðinum, men at vænta, at virkin kapping kemur í orsaka av hesari lóg og at kalla elveitingarlógina fyri liberalisering, er eftir okkara tykki gykl.

Eftir stendur, at einki fokus er sett á meginspurningin: At vinnufyritøkur og borgarar kunnu fáa atgongd til ein lægri prís á elveiting.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag



Jan Mortensen